Umhvørvismálaráðið

Dagfesting:	7. mars 2023
Mál nr.:	23/02877
Málsviðgjørt:	PB
Ummælistíð:	23.07.21-06.09.21
Eftirkannað:	10.02.2023

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um náttúrufriðing
(Striking av friðingarheimildum o.a.)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 48 frá 9. juli 1970 um náttúrufriðing, sum broytt við løgtingslóg nr. 64 frá 13. juni 1995, løgtingslóg nr. 110 frá 29. juni 1995 og løgtingslóg nr. 168 frá 16. desember 2021, verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 1, stk. 2-5, verða strikað.

2. Í § 2, stk. 2, verður "eigur" broytt til: "skal".

3. Í § 2, stk. 3 og 6, verður "sóknarstýri" broytt til: "kommunustýri".

4. Í § 2, stk. 6, verður "viðalundarnevndini" broytt til: "skógfriðingarnevndini".

5. Í § 4, stk. 2, 1. pkt., verður "sermerkt landslag" broytt til: "sereyðkenni við landslagnum".

6. II. partur verður strikaður.

7. § 12, stk. 1, verður orðað soleiðis: "Friðingarnevndin heldur fund, tá ið áheitan kemur frá landsstýrismanninum, yvirfriðingarnevndini, Búnaðarstovuni, einum kommunustýri ella einum eigara ella brúkara, sum vil hava eitt av teimum í hesi løgtingslógini umrøddu loyvunum. Annars kemur nevndin saman, tá ið hon sjálv heldur tað vera neyðugt."

8. Í § 13, stk. 2, verður "Føroya Jarðarráð" broytt til: "Búnaðarstovan".

9. §§ 14 og 15 verða strikaðar.

10. § 16, stk. 1 og 4, verða strikað.
Stk. 2 og 3 verða eftir hetta stk. 1 og 2.

11. §§ 17-20 verða strikaðar.

12. § 21, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Avgerðir, sum friðingarnevndirnar taka, kunnu skjótast inn fyri yvirfriðingarnevndina av einum og hvørjum, ið hevur verið á fundi undir viðgerðini av málinum ella hevur sent inn skrivliga greinargerð, somuleiðis av landsstýrismanninum, Búnaðarstovuni ella einum kommunustýri, sum hevur áhuga fyri málinum."

13. § 21, stk. 4, verður orðað soleiðis:
"*Stk. 4.* Avger yvirfriðingarnevndin sambært stk. 3, at ein av friðingarnevndini gjørd viðtøka ikki kann góðtakast, verður málið at senda aftur til nýggja viðgerð í friðingarnevndini, uttan so at yvirfriðingarnevndin heldur, at málið er dottið burtur. Yvirfriðingarnevndin kann eisini gera av, at málið skal viðgerast sum kærumál eftir teimum fylgjandi reglunum."

14. § 21, stk. 5 og 6, verða strikað.

15. § 26 verður orðað soleiðis:

"**§ 26.** Útreiðslurnar til virkið hjá friðingarnevndunum og yvirfriðingarnevndini verða goldnar úr landskassanum."

§ 2

Stk. 1. Henda løgtingslógin kemur í gildi 1. januar 2024.
Stk. 2. Friðingarmál, sum eru byrjað, tá ið henda løgtingslógin kemur í gildi, verða avgreidd av verandi náttúrufriðingarmyndugleikum eftir higartil galdandi reglum.
Stk. 3. Friðingarúrskurðir við heimild í § 6 í løgtingslóg nr. 48 frá 9. juli 1970 um náttúrufriðing, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 168 frá 16. desember 2021, verða verandi í gildi, til landsstýrismaðurin tekur aðra avgerð.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Lógaruppskotið hongur saman við uppskotinum til løgtingslóg um náttúruvernd. Av tí at ein partur av evnisøkinum hjá náttúrufriðingarlógini verður fluttur í ta nýggju náttúruverndarlógina, verður ein partur av náttúrufriðingarlógini strikaður.

Tann nýggja náttúruverndarlógin ásetur nýggjar reglur um skipan av verndarøkjum og vernd av dýra- og plantusløgum, og tí verða friðingarheimildirnar tiknar úr náttúrufriðingarlógini. Eftir tí nýggju náttúruverndarlógini verður tað landsstýrismaðurin, sum við kunngerð skal kunna seta slík verndartiltøk í verk, og ein náttúrufyrisiting undir landsstýrismanninum, sum skal skipa og sita fyri verndini í verki.

Eftir í náttúrufriðingarlógini verða tættir av skipanarligum slag, sum ikki verða mettir at hóska natúrliga saman við evnisøkinum fyri ta nýggju náttúruverndarlógina, t.e. serliga ásetingarnar um loyvi til bygging, vegagerð o.a. í økjum, sum eru fevnd av §§ 2-4.

Tað verða framvegis tær staðbundnu friðingarnevndirnar og yvirfriðingarnevndin, sum verða myndugleikar eftir náttúrufriðingarlógini.

Tað eru heilt nógv ár síðan, at lendisfriðingarheimildin í § 6 varð brúkt seinast, og heimildin í § 8 at friða dýra- og plantusløg og jarðfrøðilig fyribrigdir við kunngerð er ongantíð brúkt. Tí verður ikki talan um nakra stóra broyting í umsitingarbyrðuni hjá friðingarnevndunum og yvirfriðingarnevndini.

1.2. Galdandi lóggáva

Náttúrufriðing er í dag fevnd av løgtingslóg nr. 48 frá 9. juli 1970 um náttúrufriðing við seinni broytingum. Uppskotið til náttúrufriðingarlóg varð orðað í fimmtiárunum og sent landsstýrinum í 1959. Lógin, sum varð samtykt í 1970, hevur við heilt fáum undantøkum sama orðaljóð sum uppskotið frá 1959. Lógin er gjørd við støði í táverandi lóggávu á økinum í hinum Norðurlondunum.

Náttúrufriðingarlógin er býtt í fimm partar eftir innihaldi. Í fyrsta parti eru ásetingar um náttúruvernd, inntriv, sum krevja loyvi frá friðingarmyndugleikunum, og fyrilit, sum havast skulu, tá ið slík loyvir verða givin. Í øðrum parti eru ásetingar um friðing. Í triðja parti eru ásetingar um friðingarmyndugleikarnar, t.e. friðingarnevndirnar í sýslunum og yvirfriðingarnevndina. Í fjórða og fimta parti eru ásetingar um málsviðgerðina í ávikavist friðingarnevndunum og yvirfriðingarnevndini.

Fyrisitingarmyndugleikarnir eftir náttúrufriðingarlógini eru tær staðbundnu friðingarnevndirnar og yvirfriðingarnevndin. Í yvirfriðingarnevndini sita umframt sorinskrivaran, sum er formaður, landsantikvarurin, leiðarin á Náttúrugripasavninum og tveir limir, sum landsstýrismaðurin velur.

Landsstýrismaðurin kann eftir áheitan frá yvirfriðingarnevndini við kunngerð friða dýra- og plantusløg og jarðfrøðilig fyribrigdir.

Tær staðbundnu friðingarnevndirnar viðgera mál um loyvi til bygging, vegagerð o.a. í økjum, sum eru fevnd av §§ 2-4, og friðingarmál eftir § 6. Yvirfriðingarnevndin staðfestir allar avgerðir hjá friðingarnevndunum og er eisini kærumyndugleiki fyri avgerðir hjá

friðingarnevndunum. Avgerðirnar hjá yvirfriðingarnevndini eru endaligar og kunnu eftir lógini ikki leggjast fyri dómstólarnar. Yvirfriðingarnevndin kann tó taka mál upp til nýggja viðgerð.

Tey flestu málini, sum friðingarnevndirnar og yvirfriðingarnevndin viðgera, eru umsóknir um verkætlanir o.a. í økjum, har ið tað eftir lógini krevst loyvi frá friðingarmyndugleikunum. Tað snýr seg um umsóknir um at byggja seyðahús o.a., at seta antennur upp og at gera vegir, gøtur, brýr o.a. Í onkrum førum verða broytingar í byggisamtyktum, sum fevna um økir, sum eru fevnd av § 2 í lógini, sendar friðingarnevndunum til ummælis, hóast einki krav er um hetta í lógini. Millum málini, sum krevja ta drúgvastu viðgerðina, teljast størri verkætlanir sum t.d. vatnorkuútbyggingar, men eisini eitt nú vegir og gøtur. Friðingarmálini hava verið fá í tali, men kunnu krevja drúgva viðgerð.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Tann nýggja náttúruverndarlógin ásetur nýggjar reglur um skipan av verndarøkjum og vernd av dýra- og plantusløgum, og tí verða friðingarheimildirnar í náttúrufriðingarlógini strikaðar. Eftir tí nýggju náttúruverndarlógini verður tað landsstýrismaðurin, sum við kunngerð skal kunna seta slík verndartiltøk í verk, og ein náttúrufyrisiting undir landsstýrismanninum, sum skal skipa og sita fyri verndini í verki.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Við lógaruppskotinum, sum hongur saman við uppskotinum til løgtingslóg um náttúruvernd, verða friðingarheimildirnar í náttúrufriðingarlógini strikaðar. Eftir tí nýggju náttúruverndarlógini verður tað landsstýrismaðurin, sum við kunngerð skal kunna seta slík verndartiltøk í verk, og ein náttúrufyrisiting undir landsstýrismanninum, sum skal skipa og sita fyri verndini í verki.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Lógaruppskotið varð saman við uppskotinum til løgtingslóg um náttúruvernd sent Biofar, Bóndafelag Føroya, Ferðavinnufelagnum, Froskmannafelagnum, Føroya ferðaleiðarafelag, Føroya Fuglafrøðifelag, Føroya Lívfrøðingafelag, Føroya Náttúru- og Umhvørvisfelag, Føroya Óðalsfelag, Føroya Ríðingarfelag, Føroya Sílaveiðufelag, Føroya skótaráð, Hagafelag Føroya, Ringrás og Vinnuhúsinum til hoyringar.

Lógaruppskotið varð eisini sent stjórnarráðunum, Kommunufelagnum, Búnaðargrunninum, Búnaðarstovuni, Býarskipanarnevndini, Fiskaaling, friðingarnevndunum, Fróðskaparsetri Føroya, Føroya Kærustovni, Føroya landfúta, Havstovuni, Heilsufrøðiligu starvsstovuni, Jarðfeingi, Landsverki, Løgtingsins umboðsmanni, SEV, Skógfriðingarnevndini, Tjóðsavninum, Umhvørvisstovuni, Visit Faroe Islands og yvirfriðingarnevndini til hoyringar.

Lógaruppskotið varð eisini lagt á almenna hoyringarportalin hjá landsstýrinum.

Inn komu hoyringarsvar frá Bóndafelag Føroya, Fiskaaling, Ferðavinnufelagnum, Fiskimálaráðnum, Føroya Fuglafrøðifelag, Føroya Náttúru- og Umhvørvisfelag, Føroya Óðalsfelag (saman við Bóndafelag Føroya), Hagafelag Føroya, Havbúnaðarfelagnum, Havstovuni, Heilsufrøðiligu starvsstovuni, Jarðfeingi, Kommunufelagnum, náttúrufriðingarnevndini fyri Eysturoyar sýslu, náttúrufriðingarnevndini fyri Norðoya sýslu, náttúrufriðingarnevndini fyri Suðuroyar sýslu, Ringrás (saman við Føroya Náttúru- og Umhvørvisfelag), Umhvørvisstovuni, Uttanríkis- og mentamálaráðnum, Visit Faroe Islands og

yvirfriðingarnevndini. Almannamálaráðið og SEV boðaðu frá, at tey ongar viðmerkingar høvdu til lógaruppskotið.

Tey innkomnu hoyringarsvarini eru løgd við lógaruppskotinum umframt eitt ummælisskjal, har ið hoyringarsvarini verða viðgjørd. Víst verður til fylgiskjal 24.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið fær ikki fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

Nógv tey flestu málini, sum í dag verða viðgjørd í teimum staðbundnu friðingarnevndunum og yvirfriðingarnevndini, eru umsóknir um verkætlanir o.a. í økjum, har tað eftir lógini krevst loyvi frá friðingarmyndugleikanum.

Tað eru nógv ár síðan, at lendisfriðingarheimildin í § 6 varð brúkt seinast, og heimildin í § 8 at friða dýra- og plantusløg og jarðfrøðilig fyribrigdir við kunngerð er ongantíð brúkt. Av tí at talan sostatt ikki verður um stórvegis broyting í umsitingarbyrðuni, verður ikki mælt til at broyta játtanina á løgtingsfíggjarlógini til rakstur av virkseminum hjá teimum staðbundnu friðingarnevndunum og yvirfriðingarnevndini.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið fær ikki umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið fær ikki avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hongur saman við uppskotinum til løgtingslóg um náttúruvernd, og tí verður eisini víst til tað lógaruppskotið. Samanumtikið verður mett, at tað, at friðingarheimildirnar verða fluttar í ta nýggju náttúruverndarlógina og lagdar til landsstýrismannin, fer at gagna umhvørvinum.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið fær ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið fær ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Lógaruppskotið fær ikki avleiðingar við atliti at millumtjóðasáttmálum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Lógaruppskotið fær ongar beinleiðis avleiðingar við atliti at tvørgangandi millumtjóðasáttmálum.

2.9. Markaforðingar
Lógaruppskotið fær ikki avleiðingar við atliti at marknaforðingum.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ikki skattir og avgjøld við sær.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ikki gjøld við sær.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið hongur saman við uppskotinum til løgtingslóg um náttúruvernd. Samstundis sum friðingarheimildirnar hjá friðingarmyndugleikunum eftir náttúrufriðingarlógini verða strikaðar, útvegar uppskotið til løgtingslóg um náttúruvernd landsstýrismanninum nýggjar heimildir til økisvernd og vernd av dýra- og plantusløgum.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd at privatari ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd at privatari ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar	[redacted]		Nei	Nei	[redacted]

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Til nr. 1
Viðurskiftini í § 1, stk. 2-5, verða mett at vera fevnd av kunngerð nr. 147 frá 19. oktober 1995 um burturkast, sum hevur heimild í løgtingslóg nr. 134 frá 1988 um umhvørvisvernd.

Til nr. 2
Við broytingini verður orðið "eigur" broytt til "skal". Broytingin skal gera tað greiðari, at talan er um eitt krav heldur enn eitt tilmæli.

Til nr. 3
Við broytingini verður "sóknarstýri" broytt til "kommunustýri", sum er tað rætta heitið í dag.

Til nr. 4
Við broytingini verður "viðalundarnevndini" broytt til "skógfriðingarnevndini", sum er tað rætta heitið sambært løgtingslóg um viðarlundir.

Til nr. 5
Orsøkin til broytingina er ósamsvar millum danska og føroyska lógartekstin. Orðingin í danska tekstinum var "landskabets særpræg". Yvirfriðingarnevndin hevur tulkað ásetingina eftir tí donsku orðingini.

Til nr. 6
Uppskotið til løgtingslóg um náttúruvernd hevur ásetingar um verndarøkir, sum koma í staðin fyri lendisfriðingarásetingina í § 6. Uppskotið til løgtingslóg um náttúruvernd hevur somuleiðis reglur fyri fyrisiting av villum dýra- og plantusløgum. Víst verður til tað lógaruppskotið.

Til nr. 7
Við broytingini verður "Føroya Jarðarráð" broytt til "Búnaðarstovan" og "sóknarstýri" til "kommunustýri".

Til nr. 8
Við broytingini verður "Føroya Jarðarráð" broytt til "Búnaðarstovan", sum er tað rætta heitið í dag.

Til nr. 9
Av tí at lendisfriðingarheimildin í § 6 verður strikað, verða §§ 14-15, sum snúgva seg um viðgerð av lendisfriðingarmálum, eisini strikaðar.

Til nr. 10
Av tí at lendisfriðingarheimildin í § 6 verður stirkað, verða stk. 1 og 3, sum snúgva seg um lendisfriðing, eisini strikaðar.

Til nr. 11
Av tí at lendisfriðingarheimildin í § 6 verður stirkað, verða §§ 17-20, sum snúgva seg um lendisfriðing, eisini strikaðar.

Til nr. 12
Við broytingini verður "Føroya Jarðarráð" broytt til "Búnaðarstovuni" og "sóknarstýri" til "kommunustýri", sum eru tey røttu heitini í dag. Eisini verða bendingarvillur í ásetingini rættaðar.

Til nr. 13
Av tí at lendisfriðingarheimildin í § 6 verður strikað, verður § 21, stk. 4, sum snýr seg um endurgjald fyri lendisfriðing, eisini strikað. § 21, stk. 6, verður tillagað og verður til nýtt stk. 4. Broytingin strikar tilsipingar til lendisfriðing, av tí at lendisfriðingarheimildin í § 6 verður strikað.

Til nr. 14
Av tí at lendisfriðingarheimildin í § 6 verður strikað, verður § 21, stk. 5, sum snýr seg um endurgjald fyri lendisfriðing, eisini strikað. § 21, stk. 6, verður strikað, men verður í nakað tillagaðari útgávu nýtt stk. 4, sbr. nr. 13 omanfyri.

Til nr. 15
Av tí at lendisfriðingarheimildin í § 6 verður strikað, verður tilsipingin til endurgjald í § 26 strikað.

Til § 2
Í stk. 1 er ásett, at løgtingslógin kemur í gildi 1. januar 2024. Hetta er sama orðing, sum brúkt verður í uppskotinum til løgtingslóg um náttúruvernd, og ætlanin er, at bæði lógaruppskotini skulu koma í gildi í senn.

Stk. 2 er ein skiftisregla viðvíkjandi møguligum friðingarmálum, sum eru byrjað, tá ið lógin kemur í gildi. Hesi málini skulu friðingarnevndirnar avgreiða eftir higartil galdandi reglum.

Eftir stk. 3 verða friðingarúrskurðir við heimild í § 6 verandi í gildi, eftir at ásetingin er farin úr gildi. Tað ber eisini í sær, at treytirnar í § 9 framvegis galda fyri slík friðingartiltøk, hóast § 9 fer úr gildi.

Umhvørvismálaráðið, 7. mars 2023

Ingilín D. Strøm
landsstýrismaður

/ Pól E. Egholm

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Hoyringarsvar Yvirfriðingarnevndini
Fylgiskjal 3: Hoyringarsvar frá Fiskimálaráðnum
Fylgiskjal 4: Hoyringarsvar frá Suðuroyar sýslu
Fylgiskjal 5: Hoyringarsvar frá Kommunufelagnum

Fylgiskjal 6: Hoyringarsvar frá Hagafelag Føroya
Fylgiskjal 7: Hoyringarsvar frá Ferðavinnufelagnum
Fylgiskjal 8: Hoyringarsvar frá Havstovuni
Fylgiskjal 9: Hoyringarsvar frá Jarðfeingi
Fylgiskjal 10: Hoyringarsvar frá SEV
Fylgiskjal 11: Hoyringarsvar frá Umhvørvisstovuni
Fylgiskjal 12: Hoyringarsvar frá Visit Faroe Islands
Fylgiskjal 13: Hoyringarsvar frá Uttanríkis- og mentamálaráðnum
Fylgiskjal 14: Hoyringarsvar frá Føroya Fuglafrøðifelag
Fylgiskjal 15: Hoyringarsvar frá Havbúnaðarfelagnum
Fylgiskjal 16: Hoyringarsvar frá Almannamálaráðnum
Fylgiskjal 17: Hoyringarsvar frá Náttúrufriðingarnevndini fyri Eysturoyar sýslu
Fylgiskjal 18: Hoyringarsvar frá Náttúrufriðingarnevndini fyri Norðoya sýslu
Fylgiskjal 19: Hoyringarsvar frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni
Fylgiskjal 20: Hoyringarsvar frá Fiskaaling
Fylgiskjal 21: Hoyringarsvar frá Bóndafelag Føroya
Fylgiskjal 22: Hoyringarsvar frá Føroya náttúru- og umhvørvisfelag og Ringrás
Fylgiskjal 23: Bóndafelag Føroya og Føroya Óðalsfelag
Fylgiskjal 24: Ummælisskjal